VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

# Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 02.02.2021 kl. 18:00 |
| **Fundarstaður:** | |
| **Málnr.:** | 21/00003 |
| Til staðar: | Bjarni Prior, Albert Ellefsen, Dagbjørn Hansen, Rósa Samuelsen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Ásla Leila Johansen, Sólfríð Fjallsbak, Jens Gaardlykke, Jóanis Albert Nielsen, Herborg Gaardlykke |
| Varalimir: | |
| Ikki til staðar: | |
| Aðrir partar: | Sølvi Simonarson, Anna Malena Thomassen |
| Fundarskrivari: | Jóhan Hendrik Ellefsen |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til afgørelse** | | | |
| 24/21 | 21/00105-2 | Mál beind í nevnd 2021 | 3 |
| 25/21 | 20/00546-4 | Umsókn, frá Jens Jákup Hansen og Jónfinn Stenberg, um stuðul til at gera ein dokumentarfilm um fótbóltin í Vágum í 1988 | 4 |
| 26/21 | 20/01150-2 | Umsókn um stuðul frá Verkætlanini Føroyski Talukennarin | 5 |
| 27/21 | 20/01195-2 | Umsókn um stuðul til 2. part av bókini "Den færøske emigration til Canada før 2. verdenskrig" | 6 |
| 28/21 | 20/01199-9 | Umsókn um byggiloyvi. Matr. 4k Við Stóraklett 17, Sandavágur | 7 |
| 29/21 | 20/01062-12 | Umsókn um byggiloyvi á matr.nr. 4p í Sandavági | 9 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 30/21 | 20/01066-4 | Støðutakan til uppskot til grundstykkir við Gudmundargøtu | 10 |
| 31/21 | 21/00069-3 | Útbjóðing av spillvatnsætlan frá Valloyruni vestur móti Tváttá | 12 |
| 32/21 | 19/00728-11 | Útbjóðing gøta millum Tvørgarð og Húsagarð | 13 |
| | | | |

Formansváttan:___________

**VÁGA KOMMUNA**

**Til afgørelse**

## 24/21 Mál beind í nevnd 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 02.02.2021 | 24/21 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 02. februar 2021:**
**Avgerð:**

Formansváttan:____________

## 25/21 Umsókn, frá Jens Jákup Hansen og Jónfinn Stenberg, um stuðul til at gera ein dokumentarfilm um fótbóltin í Vágum í 1988

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 18.01.2021 | 2/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.01.2021 | 4/21 |
| 3 Býráðið | 02.02.2021 | 25/21 |

**Málslýsing:**

Jens Jákup Hansen og Jónfinn Stenberg ætla at gera ein dokumentarfilm um fótbóltin í Vágum í 1988. Í hesum sambandi søkja teir um stuðul frá Vága kommunu um kr. 100.000.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 18. januar 2021:**
**Avgerð:**

Viðmælt at stuðla við kr. 25.000.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2021:**
**Avgerð:**
Viðmælt at taka undir við Mentunar- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 02. februar 2021:**
**Avgerð:**

Samtykt at stuðla við kr. 25.000.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 26/21 Umsókn um stuðul frá Verkætlanini Føroyski Talukennarin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 18.01.2021 | 8/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.01.2021 | 5/21 |
| 3 Býráðið | 02.02.2021 | 26/21 |

**Málslýsing:**

Verkætlanin Føroyski Talukennarin hevur søkt Kommunufelagið um stuðul á kr. 1.000.000. Stýrið í Kommunufelagnum mælir til, at allar kommunur stuðla verkætlanini lutfalsliga. Lutfalsligi parturin hjá Vága kommunu verður kr. 40.860.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 18. januar 2021:**
**Avgerð:**

Viðmælt at stuðla lutfalsliga eftir íbúgvatalinum.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2021:**
**Avgerð:**
Viðmælt at taka undir við Mentunar- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 02. februar 2021:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við mentunar- og trivnaðarnevndini.

Formansváttan:__________

## 27/21 Umsókn um stuðul til 2. part av bókini "Den færøske emigration til Canada før 2. verdenskrig"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 18.01.2021 | 9/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.01.2021 | 6/21 |
| 3 Býráðið | 02.02.2021 | 27/21 |

**Málslýsing:**

Steffen Stumann Hansen søkir um stuðul til 2. part av bókini «Den færøske emigration til Canada under 2. verdenskrig». Søkt verður um kr. 35.000.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 18. januar 2021:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at stuðla við kr. 25.000.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2021:**
**Avgerð:**

Viðmælt at taka undir við Mentunar- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 02. februar 2021:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við mentunar- og trivnaðarnevndini.

Formansváttan:__________

# 28/21 Umsókn um byggiloyvi. Matr. 4k Við Stóraklett 17, Sandavágur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 22.01.2021 | 6/21 |
| 2 Býráðið | 02.02.2021 | 28/21 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr.nr. 4k í Sandavági søkir um byggiloyvi til sethús.

Umsitingin hevur byggimálsviðgjørt umsóknina, og lýkur hon allar treytir uttan frástøðu til grannamark.

Grannin, sum eigur matr. nr. 4l er hoyrdur, og hevur hann svara aftur, at hann hevur onki ímóti at ætlaða byggingin kemur nærri sínum marki enn 2,5 m.

Váttan frá granna um, at teir góðtaka at tað verður bygt nærri marki enn 2,5m.er viðløgd í málinum.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Matrikkulin liggur í øki B-Sethúsaøki.
Ásetingarnar fyri fráleikar í byggisamtyktini eru, sum niðanfyrisdtandandi::

Byggingarfyriskipandi ásetingar
§24 Byggingarfráleikar

7. Bilskúrar, hjallar, skúrar og smá úthús við ongum eldstaði, kunnu verða bygdir nærri grannamarki, tá ið hesar treytir verða loknar:
a) Hædd á planering verður ásett av byggivaldinum.

b) Bygningurin má ikki í einum fráleika upp til 2,5 m. frá grannamarki vera hægri enn 3,5 m.

c) Takvatn skal verða hildið á egnari grund.

d) Veggur móti grannamarki, skal verða gjørdur sum eldverjuveggur. Frávik frá hesum er loyvt, tá ið tað ikki veksur um vandan av eldi.

**Tekniska nevnd 22. januar 2021:**
**Avgerð:**

Formansváttan:

Viðmælt.

**<u>Býráðið 02. februar 2021:</u>**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan: ____________

## 29/21 Umsókn um byggiloyvi á matr.nr. 4p í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 22.01.2021 | 3/21 |
| 2 Býráðið | 02.02.2021 | 29/21 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr.nr. 4p í Sandavági søkir um byggiloyvi til tvíhús á matr.nr. 4p í Sandavági.

Í byggisamtyktini er ásett, at neyðugt er við serloyvi frá byggivaldinum, um loyvt skal verða at byggja tvíhús í øki B: sethúsaøki:

Umsóknin verður tí løgd fyri býráðið til støðutakan.

Umsitingin hevur viðgjørt umsóknina, og lýkur bygningurin annars øll krøv í byggisamtyktini og -kunngerðini.

**Tekniska nevnd 22. januar 2021:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Býráðið 02. februar 2021:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan: ____________

# 30/21 Støðutakan til uppskot til grundstykkir við Gudmundargøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 22.01.2021 | 4/21 |
| 2 Býráðið | 02.02.2021 | 30/21 |

**Málslýsing:**

HMP hevur gjørt uppskot til grundstykkir á Gudmundargøtu. Í uppskotinum verður tilrátt at gera nógv fleiri gøtur, enn vanligt hevur verið í øðrum útstykkingum í kommununi. Orsøkina siga teir vera, at har mælt verður til at gera gøtur, liggja rør hjá kommununi, m.a. kloakkrør.

Umsitingin mælir til at umrøða møguleikan, bert at gera eina gøtu frá Mikkjalsgøtu oman í Gudmundargøtu og eina frá Gudmundargøtu millum stykki 04 og 08 heim til morenuheyggjarnar, meðan restin av økinum vera løgd afturat nærmastu grundstykkjum við áseting í ognarbrævinum um, at leiðingarnar skulu liggja, har tær liggja.
Grundgevingin er, at tað er kostnaðarmikið at gera gøturnar og halda tær viðlíka. Stórur jarðarmunur er millum verandi grundstykkir á Mikkjalsgøtu og tey nýggju, so um gøta verður gjørd har, er neyðugt við høgum garði niðanfyri hesa.
Mett verður, at tað neyvan er tørvur á so nógvum gøtum, sum mælt verður til at gera, eins og ivasamt er, hvussu glaðir grannarnir vera fyri almennar gøtur millum grundstykkir teirra.
Í originalu ognarbrøvunum hjá kommununi stendur í stykki 9:

> *"Kommunustýrið tekur sær rætt til at gera og halda í góðum standi kloakkverk, vatnveitingar, el-veitingar, og seta upp steyrar, fikspunktir, poligonpunktir, brandkranar o.t. eins og leidningar av øllum slagi yvir og ígjøgnum grundstykkið uttan endurgjald til eigaran".*

Mælt verður til at heita á US um at fremja sundurbýti eftir tilmæli frá býráðnum.

**Tekniska nevnd 22. januar 2021:**
**Avgerð:**

Viðmælt at fylgja uppskotinum hjá HMP

**Býráðið 02. februar 2021:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

## 31/21 Útbjóðing av spillvatnsætlan frá Valloyruni vestur móti Tváttá

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 22.01.2021 | 7/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.01.2021 | 2/21 |
| 3 Býráðið | 02.02.2021 | 31/21 |

**Málslýsing:**

Listatión var hildin fríggjadagin 18. desember 2020, og komu tvey tilboð inn.

Nr 1 Grevstur og planering v/Eggaba Andreasen kr. 2.284.012,-

Nr 2 Sp/f Descon v/ Dánial Johansen Kr. 3.996.590,80,-

MEL hevur kannað tilboðini, og mælir til at taka av lægra tilboðnum.

**Tekniska nevnd 22. januar 2021:**
**Avgerð:**

Viðmælt at takað av lægsta tilboð.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2021:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at taka undir við Teknisku nevnd.
Arbeiðið verður fíggjað við verandi játtan, sum er 1.5 mió.kr. Restin verður fíggjað við eykajáttan.

**Býráðið 02. februar 2021:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Tórdis D. Johannesen luttók ikki í viðgerini av málinum.

Formansváttan:__________

## 32/21 Útbjóðing gøta millum Tvørgarð og Húsagarð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 22.01.2021 | 8/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.01.2021 | 8/21 |
| 3 Býráðið | 02.02.2021 | 32/21 |

**Málslýsing:**

Arbeiðið at gera gøtu millum Tvørgarð og Húsagarð var boðið út í innbodnari licitatión.
4 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða, hesir vóru:
Erhard Dam
Sp/f Descon
Sp/f Grevstur og planering
Sp/f PH Grevstur

Tvey tilboð uppá arbeiði komu inn frá Erhard Dam og PH Grevstur.

Erhard Dam hevði lægsta tilboð áljóðandi Kr. 341.475,-
Eisini hevði hann eitt alternativt tilboð áljóðandi Kr. 230.668,-

Tilboðið frá PH Grevstur var áljóðandi Kr. 512.000,-
Og hevði hann eisini eitt alternativt tilboð áljóðandi Kr. 425.000,-

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Alternativa tilboðið er uttan brúgvar, sum eru vístar á viðheftu tekningum, og er ætlanin heldur at leggja rør í gilini, og fylla upp við tilfari.

Kostnaðarmetingin av arbeiðinum var Kr. 450.000,-

Umsitingin mælir til at takað av lægsta tilboðnum, ella av alternativa tilboðnum.

**Tekniska nevnd 22. januar 2021:**
**Avgerð:**

Viðmælt at takað av alternativa tilboðnum frá Erhard Dam.
Sólfríð Fjallsbak og Jens Gaardlykke mæla til at broyta verkætlanina.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

**<u>Fíggjarnevndin 28. januar 2021:</u>**
**Avgerð:**
Viðmælt at taka undir við Teknisku nevnd.

**<u>Býráðið 02. februar 2021:</u>**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 20.06

Bjarni Prior

Albert Ellefsen

Dagbjørn Hansen

Rósa Samuelsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Ásla Leila Johansen

Sólfríð Fjallsbak

Jens Gaardlykke

Jóanis Albert Nielsen

Herborg Gaardlykke

Formansváttan: